## Hósdagur 8. november

### SVF

18.30 Smásøgur
18.35 Jumanji 29
18.55 Kristian og Ruth - Søren Ryge Petersen sigur frá
19.25 Fyrsti fongurin (e)
20.00 Dagur og Vika við Grannum okkara
20.50 Horvin 7:8 - donsk dokumentarrøð
21.20 Ally McBeal 11 - amerikonsk røð
22.05 Roomservice - íbúðin verður broytt
22.35 Krimitímin: Dalziel og Pascoe 2:2
23.25 Liðugt

### Eurosport.com

07:30 Weightlifting
08:30 Golf
09:00 Sailing
10:00 Sailing
10:30 Car Racing
11:00 Beach Soccer
12:00 Weightlifting
13:00 Snooker
15:00 Weightlifting (Live)
16:45 News
17:00 Football
17:30 Football
18:00 Weightlifting (Live)
20:00 Football
21:00 Football
22:00 News
22:15 Boxing
23:15 Formula 1
23:45 Weightlifting
00:15 News
00:30 Close

### BBC Prime

0.00 The Argentinian Journey: »Pacha Mama – Sacred Land«
1.00 Century of Flight: »High Above the Trenches«
2.00 TLZ: »Glasgow 1998 - Supporting the Arts«
2.30 TLZ: »Smithson & Serra: Beyond Modernism?«
2.55 TLZ: »Cyberart«
3.00 TLZ: »Art of the Restorer«
3.25 TLZ: »Music E. Motions - Eternal Father«
3.30 TLZ: »Hidden Visions«
4.00 TLZ: »Troubleshooter – Neither Fish Nor Fowl«
4.40 TLZ: »Landmarks – Tudors and Stewarts – Charles I«
5.00 TLZ: »Greek Language & People – Meeting People«
5.30 Muzzy In Gondoland
6.00 Bodger and Badger: »Mrs. Dribble and the Queen«
6.15 Playdays: »The Whybird Stop«
6.35 Steps To the Stars
7.00 Ready Steady Cook
7.30 Big Kevin Little Kevin: »Scotland And Nova Scotia«
8.00 House Invaders: »Minster-In-Thanet«
8.30 Going for a Song
9.00 Battersea Dogs Home
9.30 Vets in Practice: »Love is all Around«
10.00 Radical Highs
10.15 The Weakest Link
11.00 Dr. Who: »Attack of the Cybermen«
11.30 Doctors
12.00 Eastenders
12.30 Hetty Wainthropp Investigates: »The Astral Plane«
13.30 Radical Highs
13.45 Ready Steady Cook
14.15 Bodger and Badger: »Mrs Dribble and the Queen«
14.30 Playdays: »The Whybird Stop«
14.50 Steps To the Stars
15.15 TOTP Eurochart
15.45 Ainsley's Gourmet Express: »Sushi & Noodles«
16.15 Ground Force: »Lancaster«
16.45 Miss Marple: »A Pocketful of Rye«
17.45 The Weakest Link
18.30 Doctors
19.00 Eastenders
19.30 Murder Most Horrid: »A Determined Woman«
20.00 Aristocrats
21.00 Big Train
21.30 A History of Britain: »Nations«
22.30 Living with the Enemy: »Farmer V Vegan«
23.00 Maisie Raine: »Go Bananas«

### BBC World

0:00 BBC News
0:30 HARDtalk (r)
1:00 BBC News
1:30 World News Tonight
2:00 BBC News
2:30 Talking Movies (r)
3:00 BBC News
3:30 Asia Today (r)
3:45 World Business Report (r)
4:00 BBC News
4:30 HARDtalk
5:00 BBC News
5:30 World Business Report
6:00 BBC News
6:30 World Business Report
7:00 BBC News
7:30 World Business Report
7:45 Sport Today
8:00 BBC News
8:30 HARDtalk (r)
9:00 BBC News
9:45 Sport Today
10:00 BBC News
10:30 Simpson's World (r)
11:00 BBC News
11:30 HARDtalk (r)
12:00 BBC News
12:30 World Business Report
12:45 Sport Today
13:00 BBC News
14:00 BBC News
14:30 Simpson's World (r)
15:00 BBC News
15:30 Asia Today
16:00 BBC News
16:30 HARDtalk (r)
17:00 BBC News
17:30 World Business Report
17:45 BBC News
18:30 World Business Report
18:45 Sport Today
19:00 BBC News
19:30 HARDtalk (r)
20:00 BBC News
20:30 Simpson's World (r)
21:00 BBC News
21:30 World Business Report
22:00 BBC News
22:30 Click Online
23:00 BBC News
23:30 World Business Report (r)
23:45 Asia Today

### TV3

05:00 Børne-hjørnet med Disney
07:00 TV-shop
08:00 Panter-tanter(G)
08:25 Ricki Lake (G)
09:15 Ricki Lake
10:10 Horton-sagaen(G)
11:00 Horton-sagaen
11:50 Blossom(G)
12:20 Panter-tanter
12:50 Vild med dig
13:20 Pæn pige - sej sild
13:45 Baywatch Hawaii(G)
14:40 Blossom
15:10 Min kære familie
15:40 Baywatch Hawaii
16:35 Ricki Lake
17:30 Med på moden
18:00 Sabrina - skolens heks
18:30 Alle tiders barnepige
19:00 Robinson - Talkshow
20:00 Seernes Favorit
22:05 Tve-kampen(G)
23:05 Vore værste år
23:35 Simpsons
00:05 Ricki Lake(G)
01:00 Drøm videre
01:30 Vore værste år (G)
02:00 Simpsons(G)
02:30 Sunset Beach
03:15 Godnat

### ÚF

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlestur - Steingrím Niclasen í Havn lesur
07.15 Barnaløtan - Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
07.30 Tíðindi
07.35 Morgunrásin - Hilmar Jan Hansen og Bjarni Mohr leggja til rættis
08.00 Tíðindi
08.03 Morgunrásin
09.00 Tíðindi
09.03 Sjónarringurin (e) - Árni Joensen leggur til rættis
09.35 Dagsins tónar
09.50 Morgunlestur (e) - Steingrím Niclasen í Havn lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 2 - Beinta og Elsa Maria leggja til rættis
10.10 Tit skriva, vit spæla - Øssur Egholm skipar fyri
11.00 Tíðindi
11.03 Á sanganna veingjum (e) - Gunnvør Poulsen stilar fyri
11.35 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 Fimmarin (e) - Helgi Jacobsen leggur til rættis
15.00 Tíðindi
15.03 Nýtt og gott gamalt - Tróndur Vatnhamar velur løgini
16.00 Tíðindi
16.03 Bitar úr Billboard - Rúni Jákupsson stílar fyri
17.00 Tíðindi
17.05 Í víngarðinum - Alexander Samuelsen stílar fyri
18.00 Barnaløtan (e) - Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Skiftissiðir á lívsleiðini: Konfirmatión - Armgarð Arge leggur til rættis
19.30 Crescendo - Kári Olsen stílar fyri
20.30 Uppgávufólk - 2. partur av stuttsøgu eftir Jeppe Åkjær. Hanna Lisberg týddi og lesur
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur - Øssur Egholm leggur til rættis
22.00 Ljóðmúrurin - Regin Egholm skipar fyri
23.00 Tíðindi

## Skiftissiðir á lívsleiðini: Konfirmatión

**ÚF Hóskvøldið kl. 19.00**

Mangar mentanir hava pubertetsskiftissiðir. Hildið verður, at tá barnið er um 14 ára aldur er tað vaksið og kann taka ábyrgd. Fyrr fóru dreingirnir til skips og gentur fóru út at tæna, tá tey vóru fermd.
Men soleiðis er als ikki í dag. Gestir í útvarpsstovuni eru tannáringarnir Hans,Jógvan, Teitur, Anna Katrina og Rakul og lektari í religión Anne-Lene Olofson.

## Fyrsti fongurin (e)

**SVF Hóskvøldið kl. 19.25**

Feðgarnir báðir Eiler og Sámal Jacobsen royna saman eftir sild við Krúnborg. Hetta er fyrstu ferð, at Sámal skal royna seg sum skipara á sildaveiðu, og tá er gott at hava ein royndan mann sum Eiler við á túrinum. Eiler er ein av teimum royndastu skiparunum í Føroyum, og onkur góð ráð kann hann teska í oyrað á soninum. Leiðin gongur norður til Jan Mayen, og síðani til Noregs at selja.

*Lagt til rættis: Zacharias Hammer. Klipt: Ragnar A. Jacobsen og Zacharias Hammer. Fotograferað: Zacharias Hammer og Árni Conradsson.*

*Sendingin varð fyrstu ferð send sunnudagin 4. november.*

## Sabrina – skolens heks




Sabrina er heil illa fyri eftir at hon hevur kist Josh, og hon roynir at fáa Harvey at umbera henni misstaki uttan at skulu siga orsaka sjálv. Meðan hetta fer fram, so tving Hilda og Zelda tvær heksahatarar til at gera thanksgiving døgurðan.

## Veljið filmin




Í kvøld verður møguligt at velja hvønn film, hyggjararnir vilja síggja. Valið er millum:
Mermaids frá 1990 við Cher, Bob Hoskins pgWinona Ryder í høvuðsleiklutunum.
Forført til succes frá 1987 danskur filmur við Michael J. Fox í høvuðsleiklutunum.
Dragnet frá 1987 við Dan Aykroyd, Tom Hanks, Christopher Plummer og Harry Morgan í høvuðsleiklutunum.
Tað ber til at atkvøða á telefonnummar 38 38 35 00

### Rás 2

09:45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10:00 Leysaløtan (e) - Endursending frá í gjár - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith og Sunneva Petersen leggja til rættis
11:00 Tónleikur
12:00 Tíðindi og kunngerðir
12:15 Tónleikur
13:00 Ynskiløtan - Heilsur frá lurtarum - Sunneva Petersen er vertur - Send heilsur um (www.ras2.fo) ella á fax. 359990.
14:00 Lýsingar
14:05 Ynskiløtan (framhald)
15:00 Tíðindi og kunngerðir
15:15 Leysaløtan - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith og Sunneva Petersen leggja til rættis
16:00 Tónleikur
17:00 Norðlýsið - Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík - John William og Oliver Joensen leggja til rættis
18:00 Tíðindi og kunngerðir
18:15 Tónleikur
19:00 Orð á leiðini (EvR) - Andaligur búnaðskapur: "Úrslitið av andaligum búnaðskapi" - Jógvan Zachariassen leggur til rættis
19:40 Tónleikur
21:00 Tíðindi og kunngerðir
21:15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21:30 Tónleikur
22:00 Girlzone - Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri. - Telefon: 35 99 93 Fax: 35 99 90 E-mail: girlzone@ras2.fo
00:00 Liðugt

### Lindin

13.00 Byrjan - Dagsskráin verður lisin
13.15 Okkara dagliga breyð
13.30 Sjómanssendingin Vitin v/ Símun Hansen (e)
14.30 Tónleikur fyri børn
15.00 Horizon Star v/ Stellu Zachariassen (e)
18.00 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending.
20.30 Okkara dagliga breyð
20.40 Lýsingar fyri møtir ið verða í vikuskiftinum.
20.55 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti (e)
21.00 Bønarlinjan við gesti, vertur er Jenis av Rana - Bønarevnu kunnu ringjast inn frá kl. 20.00. Tlf. 321377 og til ber at senda fax á nr. 321379
Vit gevast uml. middnátt



# Oljuvinnan kann verða til stórt gagn fyri Føroyar



*– Um føroyingar finna olju verða tað danir, sum fáa allan fíggjarliga vinningin av hesum. Teir kunnu tá spara ríkisveitingina burtur eftir stuttari tíð, uttan at livistøðið broytist stórvegis í Føroyum. Harvið fáa teir ein vinning uppá umleið 20 milliardir kr. í spardum útreiðslum*
*Mynd: Jan*

**Um eins nógv olja er við Føroyar, sum tað er vestan fyri Hetland, so verða føroyingar ikki fíggjarliga betri fyri enn teir eru í dag. 600 milliónir tunnur vóru upprunaliga í teimum báðu stóru hetlendsku fundunum, og við føroysku oljuskattaskipanini er henda nøgd verd um 17 milliardir fyri føroyska samfelagið. Donsku ríkisveitingarnar eru um 20 milliardir verdar. Um olja verður funnin av umleið somu nøgd sum í Hetlandi, verða ríkisveitingarnar minkaðar munandi, møguliga verða tær minkaðar heilt burtur.**

**Danir fáa sostatt allan fíggjarliga vinningin, um føroyingar finna olju, nevnliga 20 milliardir krónur. Føroyingar gerast sostatt als ikki ríkari av, at vit finna olju. Hinvegin kunnu føroyingar vinna munandi størri búskaparligt frælsi burturúr oljuvinnuni, um rætt verður farið fram.**

**Halda føroyskir politikarar fingrarnar langt burtur frá oljupengunum, so eru útlit til, at ein møgulig oljuvinna kann vera til stórt gagn fyri land okkara skrivar búskaparfrøðingurin Kári Petersen í greinini um møguligar oljuinntøkur til samfelagið**

Kári Petersen

### Búskaparlig ávirkan av oljuni

Nógv hevur verið spekulerað og hugleitt um hvussu oljan fer at ávirka føroyska samfelagið. Tað vil siga, um nú nøkur olja er har. Hinvegin sær tað ikki út til at nakar hevur hug at siga nakað um hvussu tað fer at ávirka Føroyar búskaparliga, um olja verður funnin. Undirritaði skal við hesi grein geva eitt boð uppá, hvussu tað fer at ávirka Føroyar, um eins nógv olja er í føroysku undirgrundini, sum tað er í økinum vestan fyri Hetland.

### Er oljan 360 milliardir verd ?

Avtalan um at føroyingar skuldu eiga rættin til tað ríkidømi, sum er í undirgrundini, førdi fyrr í ár til stórt rok í Danmark. Tá varð sagt í Ekstra Blaðnum, og endurgivið av føroyskum fjølmiðlum, at oljan í føroysku undirgrundini var 360 milliardir krónur verd. Poul Schluter varð av øðrum politikarum ákærdur fyri at hava latið føroyingum hetta ríkidømið undir alt ov lagaligum treytum, nevniliga, at ríkisveitingarnar skuldu minkast um føroyski landskassin fekk inntøkur frá oljuni.

Sum vit skulu síggja er talið 360 milliardir púra órealistiskt. Hóast hetta, so varð talið 360 milliardir endurtikið upp í saman av fjølmiðlunum. Skal hetta talið vera rætt, so skulu vit finna 3-4 ferðir so nógva olju, sum funnin er vestan fyri Hetland. Harafturat skal havast í huga, at virðið av oljuni fyri landskassan bert er ein brotpartur av virðinum av oljuni, meðan hon liggur í undirgrundini.

Vit fara eisini at síggja, at avtalan um at minka av ríkisveitingunum, so hvørt sum føroyingar fáa oljuinntøkur, er sera snild, sæð frá einum donskum sjónarmiði.

### Er nøkur olja har ?

Tað, at nøkur oljufeløg tíma at leita eftir olju á markinum millum Føroyar og Hetland, verður av nógvum tikið sum fullgott prógv fyri, at olja er í føroyskum øki. Tað má tó eisini havast í huga, at oljufeløg hava borað vestan fyri Hetland í 10-15 ár. Útvið 100 brunnar eru boraðir, og bert tvey oljuøki eru funnin, sum eru vinnuliga berandi. Tað, at oljufeløg bora, er eingin trygd fyri at olja er har, men er heldur ein ábending um, at ávís sannlíkindi eru fyri, at olja er har. Um ein royndarboring út av fimm eydnast, so verður hetta roknað sum eitt gott úrslit av oljufeløgunum.

### Fyritreytir

Vit fara í hesi greinini at nýta tær nøgdirnar av olju, sum funnar eru vestan fyri Hetland, og sum tað er vinnuliga forsvarligt at fara eftir. Oljuleiðirnar Foinaven og Shiehallion høvdu ávikavist 250 milliónir og 350 milliónir føt av olju, tilsamans 600 milliónir føt.

Roknað er við einum oljuprísi uppá 21 dollarar pr. fat. Í 1998 var oljuprísurin 10-12 dollarar, hann hevur síðan verið uppi ímóti 30 dollarar. Oljuprísurin hevur í seinastuni verið um 23-25 dollarar, men hann er sera svingandi. Nevnast kann, at í kolvetnisskattalógini hevur føroyska fyrisitingin nýtt oljuprísir uppá 17 dollarar og 25 dollarar. 21 dollarar er tí bert eitt leysligt met, sum hóast alt liggur miðskeiðis í teimum prísunum vit hava sæð seinastu fimm árini.

Dollarin verður settur til 8 kr. Oljuprísurin er sostatt 168 kr. pr. fat.

### Virðið av oljuni meðan hon liggur í undirgrundini

Vit kunna sostatt koma fram til, at oljan hevur eitt virði uppá 600 milliónir føt ferðir 168 kr. meðan hon liggur í undirgrundini, tað er 100,8 milliardir krónur.

### Kostnaðurin av at fáa oljuna upp

Tað er sera ymiskt frá oljuøki til oljuøki, hvussu dýrt tað er at fáa oljuna upp. Sum tað sæst í talvuni (Framleiðslukostnaðir), so er kostnaðurin 1,5 dollarar pr. fat niðri í Saudi-Arabia, 2,5 dollarar í Azerbaidjan, 12 dollarar í norskum øki, og 13 dollarar í enskum øki. Hinvegin ger tøkniligi framburðurin, at kostnaðurin kemur longur niður við tíðini. Føroyska økið verður tó roknað sum eitt torført øki, bæði tí veðrið er verri enn td. í Norðsjónum, og tí borað verður á stórum dýpi. Í føroysku oljuskattalógini verður kostnaðurin mettur til 10,5 dollarar. Hesin kostnaður skal sostatt dragast frá áðrenn ein kann koma fram til, hvussu nógv oljan er verd fyri oljufeløgini og landskassan tilsamans.

Skoytast kann uppí, at tann høgi kostnaðurin er ein høvuðsorsøk til, at Føroyar ikki gerast nakað nýtt Kuwait.

### Virðið fyri oljufeløg og landskassan

Tá kostnaðurin er frádrigin hava vit funnið fram til, hvussu nógv oljan er verd fyri oljufelagið. Sum nevnt omanfyri, er bruttovirðið umleið 21 dollarar og um kostnaðurin er 10,5 dollarar, so er nettovinningurin 10,5 dollarar pr. fat.

Hesum vinningi skal oljufelagið gjalda skatt av til føroyska samfelagið. Um talan er um eitt oljuøki av heldur vánaligari ella vanligari dygd og støðd, so er skattaprosentið 27 %. Um oljuøkið hevur nógva olju, sum er løtt at taka upp, so kann skattaprosentið fara upp til 40 %. Í roknistykkinum er roknað við hampuliga góðum (rentablum) oljuleiðum, og skattaprosentið sett til 33. Oljufelagið fær sostatt tveir triðingar av 10,5 dollarum pr. tunnu, tað er um 7 dollarar, meðan landskassin fær ein triðing av 10,5 dollarum pr. tunnu, tað er um 3,5 dollarar.

Um oljan er 100,8 milliardir verd har sum hon liggur (ella ikki liggur), so merkir hetta, at fyri at fáa oljuna upp, so kostar hetta 50,4 milliardir, bruttoinntøkan hjá oljufeløgunum verður 50,4 milliardir, nettoinntøkan (tveir triðingar) verður 33 milliardir, meðan skattainntøkan hjá landskassanum verður slakar 17 milliardir. (Sí talvu: Virði av olju fyri landskassan)

### Vandin við at fáa 17 milliardir inn í búskapin

Tá oljufeløgini hava gjørt so stórar íløgur, sum talan

**Framleiðslukostnaðir.**

Kostnaður pr. fat

| | |
|---|---|
| **Saudi-Arabia** | 1,5 $ |
| **Azerbaidjan** | 2,5 $ |
| **Noreg** | 12,0 $ |
| **Bretland** | 13,0 $ |
| **Føroyar** | 10,5 $ |

Kelda: Faktaheftet, Norska Oljumálaráðið.